## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og fyrrapartin møguliga regn, men seinnapartin turt og sólglottar, tó mjørkaflókar. Hitin millum 17 og 20 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og fyrrapartin turt og sól, men seinnapartin møguliga regn. Hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 16 og 20 stig.

# Væl nøgdir við fyrstu venjingarnar

**Um 150 ungdómar úr øllum landinum eru í hesum døgum savnaðir til fótbóltsskúla í Klaksvík, har ungdómsvenjarin hjá Liverpool FC, Andy Williams, er høvuðsvenjari**

FÓTBÓLTUR

Fyrireikararnir siga, at alt hevur gingið eftir ætlan. Týsmorgunin kl 9 møttust venjarar og hjálparfólk til Football 04 á Loftinum og løgdu seinastu tingini til rættis. Finn og Andy Williams bjóðaðu venjarunum vælkomnum og kunnaðu um, hvat fór at henda í dag.

Byrjað varð kl 10 í morgun, tá allir luttakarnir hittust á vøllinum, har í Finn og Andy Williams bjóðaðu luttakarunum vælkomnum til Football 04. Síðani fóru fyrstu venjingarnar í gongd og hildu fram til umleið kl. 12. Tá varð hildin døgverðasteðgur upp á umleið tveir tímar.

Luttakarnir høvdu møguleika fyri at svimja í døgverðatímanum eisini. Eftir døgverða hildu venjingar fram til umleið kl 16 við onkrum stuttum steðgi ímillum.

Venjingarnar týsdagin vóru í Djúpumýru, á Fossánesi og á Viðareiði. Seinnapartin vóru nakrir leikarir á einum spæliplássi í býnum og vandu, og tað dámdi teimum avbera væl.

Andy Williams nýtti eisini fyrsta dagin til at hyggja eftir leikarum og práta við venjararnar, umframt at hann vandi dreingjaliðsleikarar. Næstu tveir dagarnar fer hann at venja hini liðini. Hósmorgunin fer hann at halda fyrilestur um hugburð og hvat skal til fyri at gerast ein góður og evnaríkur leikari. Eisini fer Jákup Mikkelsen, landliðsmálverji, at greiða frá síni tíð sum yrkisleikari uttanlands.

– Alt í alt hevur gingist væl, og vóru luttakarnir vælnøgdir, tá teir fóru heim, siga fyrireikararnir.

Myndir frá degnum eru at síggja í myndasavninum á heimasíðuni: www.finneverton.com



*150 undómar úr øllum landinum er savnaðir á fótbóltsskúla í Klaksvík, Football'04, har ungdómsvenjarn hjá Liverpool FC, Andy Williams, er høvuðsvenjari. Fyrireikararnir lata væl at venjingunum*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 15 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 26 |
| Tromsø | 18 |
| Bergen | 23 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 24 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 29 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 28 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa. vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað og grynnist. Brúgvalagið haðani tilFøroya fer spakuliga eystureftir.




Lágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga í landnyrðing. Hitabrúgvin við Føroyar fer í útnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/08 kl. 06[00]–04/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 12,1°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,1 mm – mált frá 03/08 kl. 06[00]–04/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 10,9 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin næstur jørðini
31. juli: Fullmáni
7. aug.: Seinna kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. aug | 11.07 | 23.28 | 10.07 | 22.28 | 10.22 | 22.43 | 00.46 | 13.07 | 01.46 | 14.07 | 09.22 | 21.43 | 08.22 | 20.43 | 11.22 | 23.43 | 00.01 | 12.22 | 10.52 | 23.13 | — | 12.07 |
| 6. aug | 11.49 | — | 10.49 | 23.24 | 11.04 | 23.39 | 01.28 | 13.49 | 02.28 | 14.49 | 10.04 | 22.39 | 09.04 | 21.39 | — | 12.04 | 00.43 | 13.04 | 11.34 | — | 00.28 | 12.49 |
| 7. aug | 00.24 | 12.59 | 11.59 | — | - | 12.14 | 02.24 | 14.59 | 03.24 | 15.59 | 11.14 | 23.49 | 10.14 | 22.49 | 00.39 | 13.14 | 01.39 | 14.14 | 00.09 | 12.44 | 01.24 | 13.59 |
| 8. aug | 01.34 | 14.09 | 00.34 | 13.09 | 00.49 | 13.24 | 03.34 | 16.09 | 04.34 | 17.09 | — | 12.24 | 11.24 | 23.47 | 01.49 | 14.24 | 02.49 | 15.24 | 01.19 | 13.54 | 02.34 | 15.09 |

5 707265 100043 >